– Ísrael hevur oyðilagt stóran part av hernaðarligu útgerðini hjá Hizbollah, og um tað vísir seg, at tað eydnast at fáa eina sterka altjóða herdeild inn í økið við einum ST-mandati aftanfyri seg, kann Hizbollah missa sítt heim, sín sterkasta skansa, og samstundis hava bæði Iran og Sýria mist týdningarmiklasta strategiska økið í stríðnum móti Ísrael, sigur danski journalisturin Martin Krasnik um stríðið millum Ísrael og Hizbollah

PALESTINA er stóri taparin

– Tað mest syrgiliga er, at kríggið millum Ísrael og Hizbollah hevur gjørt av við allar vónir um eina loysn millum Ísrael og palestinsku sjálvstýrisøkini fyribils, tí Ísrael hevur ikki ráð til fleiri stórar og kontroversiellar avgerðir. Politiska dirvið er heilt einfalt ikki til staðar eftir eitt traumatiskt summar í Suðurlibanon, sigur korrespondenturin á Weekendavísini, Martin Krasnik, sum sjálvur hevur skrivað úr Norðurísrael undir krígnum millum Ísrael og Hizbollah

MIÐEYSTUR
Heini í Skorini
Heini_skorini@yahoo.com

– Øll vilja so fegin kjósa ein vinnara og ein tapara, og global semja tykist vera um, at Ísrael tapti, meðan Hizbollah vann. Men hetta er tengt at, hvørjar ambitiónirnar og væntanirnar vóru undan krígnum. Endamálið hjá Ísrael var – sera optimistiskt og ambitiøst – einaferð fyri allar at niðurberja Hizbollah, men hetta eydnaðist ikki. Í so máta hevur Ísrael tapt, tí stríðið fer at halda fram og kyknar uppaftur fyrr ella seinni.

Soleiðis sigur danski korrespondenturin á Weekendavísini, Martin Krasnik, um stríðið millum shiamuslimska felagsskapin Hizbollah og ísraelsku stjórnina, sum kyknaði upp aftur tann 12. juli í ár, tá tveir ísraelskir hermenn vórðu burturførdir á libanesiska markinum. Eitt søguligt og áralangt stríð, sum við jøvnum millumbilum eskalerar og elvir til beinleiðis hernaðarligar samanbrestir við stórum sivilum mannfalli.

Martin Krasnik, sum hevði fyrilestur í Miðlahúsinum í apríl mánaði í ár, hevur skrivað úr Norðurísrael undir allari kreppuni, og staddur í Norðurísrael til arbeiðis játtaði hann Sosialinum at svara nøkrum spurningum.

Ov tíðliga at kjósa vinnara

Hóast ísraelska stjórnin sambært Krasnik á ein hátt stendur eftir sum tapari, tí tað ikki eydnaðist henni at realisera fráboðaðu ætlanina um at gera av við Hizbollah, er henda niðurstøða sambært krígskorrespondentinum ov einføld. Sambært Krasnik letur heimspressan seg lumpa av sigursgongunum og sigursælu demonstratiónunum í arabiska heiminum. Tá smílandi andlitið hjá Hizbollah-leiðaranum Sheik Hassan Nasrallah trínur fram á BBC-yvirskriftunum, og tá Hizbollah-hermenn koma krúpandi undan sundursorlaðu húsatoftunum í Suðurbeirut og skíra seg sum vinnarar, kann hetta sambært Krasnik elva til misskiljingar.

– Málið hjá Hizbollah var rætt og slætt at yvirliva, og um tað er eitt succeskriterium, er tað lætt at kalla seg vinnara. Men sannleikin er, at Ísrael hevur oyðilagt stóran part av hernaðarligu útgerðini hjá Hizbollah. Um tað vísir seg, at tað eydnast at fáa eina sterka altjóða herdeild inn í økið við einum ST-mandati aftanfyri seg, kann Hizbollah missa sítt heim, sín sterkasta skansa, og samstundis hava bæði Iran og Sýria mist týdningarmiklasta strategiska økið í stríðnum móti Ísrael. Libanesiski herurin hevur fyri fyrstu ferð í tjúgu ár sent hermenn inn í Suðurlibanon, og Hizbollah, sum í áratíggjur hevur verið ein statur í statinum, er av álvara hótt. Um hetta verður eftirspælið, hevur Ísrael vunnið nógv við krígnum, sigur Martin Krasnik.

Men Krasnik leggur afturat, at tað er ov tíðliga at gera nakra niðurstøðu um, hvør vann og hvør tapti. Alt er tengt at, hvat hendir í Suðurlibanon komandi mánaðirnar.

Spurdur, hvat Hizbollah hevur